G! Festivalurin

Gøtusandur var eitt

G! 2013 er nú farið aftur um bak, og eftir standa minni, sum neyvan vera gloymd við bræði. Í 2007 var bakandi sól í Gøtu, og tað ber næstan ikki til at nevna G!, uttan at fólk minnast aftur á 2007. Soleiðis verður ivaleyst eisini við 2013 – í øllum førum tá hugsað verður um veðrið. Sandurin í Gøtu var fríggjadagin og leygardagin stúvaður við lættklæddum fólkum, sum runnu ímillum sjógvin og hitapottarnar og úti á vánni sóust bátar í hópatali. Børn og vaksin hugnaðu sær í góðveðrinum, og umstøðurnar á sandinum í Gøtu vóru avbera góðar til júst slíkt veður. Okkurt árið hevur veðrið verið so vánaligt, at ein nærmast noyddist at samla sær mót fyri at fara oman á sandin, fyri ikki at tosa um hitapottarnir. Men í ár gekk alt upp í eina hægri eind, og við yvir 20 hitastigum bleiv gøtusandur til eitt satt paradís. Veðrið hevur mangan sett sín neiliga dám á G! festivalin, men í ár vóru veðurgudarnir parti við gøtufólkunum, og heildarupplivingin gjørdist har eftir.

Barbara Holm
Umrøða av G! 2013

Fagnaðu tónleikin

Í fjør blivu nærum øll høvuðsnøvnini avlýst í síðstu løtu, men soleiðis skuldi tíbetur ikki vera í ár. Ein avlýsing var á skránni hóskvøldið, tá ið Reptile Youth ikki fingu lent til tíðina. Men eingin neyð var kortini í Gøtu, tí punkbólkurin 200 traðkaði til í evstu løtu, og megnaðu at geva fjøldini eitt brak á sandinum. Seinni hetta kvøldið var tað svenska Alina Devecerski, sum legði fyri við tí fyrsta útlendska á G! í ár.

Fríggjakvøldið vóru tað tey føroysku høvuðsnøvnini, sum áttu pallin. Eivør og Teitur framførdu bæði hetta kvøldið á sandinum, og til báðar konsertirnar var stúva á sandinum. Eivør hevur sítt høvuðssæti í Gøtu, og tað merktist. Fólk í øllum aldri leitaðu sær oman á sandin at uppliva Eivør í sínum heimaumhvørvi.

Ásgeir Trausti fangaði føroyingar

Eitt av høvuðsnøvnunum á G! í ár var íslendarin Ásgeir Trausti. 21 ára gamli sangarin gav í fjør út sína fyrstu fløgu, og beinan vegin gjørdist hann kendur í Íslandi og kring Evropa. Eisini í Føroyum er íslendarin fagnaður, og fyri mong var hann tað mest áhugaverda navnið á G! í ár. Tað var leygarkvøldið klokkan 22.55, at Ásgeir trein á pallin á spæliplássinum í Gøtu, og saman við sínum tónleikarum, har ímillum bróður hansara var, megnaði hann at rúnabinda áhoyrararnir við sínum vakra íslendska tónleiki. Ásgeir hevur bæði enskar og íslendskar útgávur av løgum sínum, men eingin ivi kann vera um, at hann tók røttu avgerðina leygarkvøldið, tá ið hann valdi at framføra síni løg á íslendskum. Fyri einum fullum spæliplássi framførdi hann í okkurt um ein tíma, og var tað fløga hansara í fullum líki og onkur stakløg aftrat, sum vóru á skránni, og sigast má, at huglagið á spæliplássinum var av tí besta hesa løtu.

Sangskattar í bossanova útgávu

Í besta veðrið varð skipað fyri einari stórari sangløtu leygarkvøldið, og sangskattar sum 1001 nátt, Eitt dýpi av dýrari tíð, Forelskaður sjónleikari og fleiri onnur løg vóru framførd á stóra pallinum á sandinum. Túsundtals festivalgestir høvdu leitað sær oman á sandin til hesa forkunnugu løtu, og saman við Eivør Pálsdóttir og Teiti Lassen framførdi bólkurin Konfekt hesi løg, og uppruna sangararnir komu út á pallin at syngja fyri, meðan teksturin til løgini stóð á einum stórskiggja á pallinum.

Nógv fólk høvdu leitað

G! G! G! G! G! G! G! G! G! G! G! G! G! G! G!